FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat ella
Kára á Rógvi , adv.fulltrúa um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo




DVEYLAN
Gólv- og vegg vask



- Vinyl
- Linolium
- Flísar
- Teppir
- Veggir

J.C. Svabosgøta 50
100 Tórshavn
Tlf. 31 41 75

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 300, P/F Klement Petersen, 600 Saltangará.

**Viðtøkur broyttar:**
08.01.2004.

*Skráseting Føroya tann 30. januar 2004*

*Kristin Balle*

VIÐMERKINGAR

# Miðvís føroysk mistíðindi

**Virgar T. Dalsgaard**



Sakleysir danir og føroyskir útisetar verða javnliga plágaðir í donskum fjølmiðlum av sonevndum fólkaupplýsarum úr Føroyum. Hesi framligu frásøgufólk, sum algoyst vilja geva dønum sítt heilt privata verðinsbílæti, hava mest sum altíð tað til felags, at tey hoyra til tann rabiata loysingarvongin í Føroyum.

Hetta gevur øgiliga slagsíðu í tíðindafluttninginum og er við til at geva dønum eina ógvuliga karikeraða mynd av føroyingum og føroyska samfelagnum. Absurda villleiðingin av dønum er gjørd við beráddum huga, tí føroysku mistíðindamenninir kunnu jú hjúkla um sína paranoia við seinni at brigsla dønum, at teir vita ov lítið um føroysk viðurskifti, so mistíðindamenn eru næstan altíð heilgarderaðir!

Føroyska heilavaskingin av donsku opiniónini hevur verið miðvíst stýrd í meira enn ein mansaldur, men hon hevur vundið nógv uppá seg! Hetta groteska fyribrigdið hevur í líka so langa tíð givið okkum útisetum nógv arbeiði við alsamt at skulla dementera, justera og korrigera vitleysar søgufalsanir, soleiðis at forfardir og manipuleraðir danir fáa eina objektivari og meira nuanceraða mynd av Føroyum.

Tað er ein heil junta av sonevndum mentafólki, sum saman við miðlamonnum loftar naivum donskum fjølmiðla-monnum, lumpar teir og billar teimum alskyns møsn inn!

At danski fjølmiðlaheimurin ferð eftir ferð júst dettur niður á sovorðin frelst fólk, er heldur enn ikki gátuført, tí tað eru somikið nógvir skilagóðir føroyingar, sum duga væl at málbera seg, og sum bæði eru søgukønari og nógv meira sakligir enn teir fullveldis-missionerarnir, sum altráðir troðka seg framat í donskum miðlum!

Man tað vera nakar, sum mælir donskum miðlamonnum til stórt sæð bara at forlova seg við frelstum loysingarfólki, tá ið teir skullu senda tíðindi úr Føroyum? Hví verða sambandsfólk og javnaðarfólk lopin um? Hvør man vísa dønum á so stakløgin heimildarfólk, og hví er so eiðasør javnvág í føroysku úrveljingini?

Tey fólk, sum danir finna fram á, eru ikki júst tyngd av analytiskum gávum - tey eru harafturímóti sera forútsigilig, tey eru ódámliga missionerandi og tað mesta, tey jabba av sær, eru rættiliga mekaniskar trúttandi endurtøkur av avgomlum slitnum klichéum, sum fyrst feðgarnir Patursson messaðu og undirhildu við meginpartin av farnu øld, og sum aftur teir ósmædnu og stórgorrandi Hoydals-feðgarnir eru farnir at júka við hesi seinastu sjey árini!

## Tríggir trútnaðir træknívar

Sjálvan føroyska valdagin, tann 20. januar máttu tolnir og hart royndir danskir lurtarar aftur standa fyri skotum. Nú høvdu danskir útvarps-journalistar trilvað seg framá eina sjáldsama løgna trio í halleluja-kórinum hjá tjóðveldisflokkinum.

***Tann fyrsti filosoffurin*** í donskum varpi var harra *Hermaður Oskarssonur,* sum skal eitast at vera *uttanveltaður* embætismaður og formaður í polit-bureau (búskaparráðnum). Hesin nýfrelsti fíggjarligi liberalistur hevur fyrr víst, at hann kann sveiggjað sum pendul við risastórum amplitudum; hann er ideologiskt ekstremt fleksibul og hevur politiska clairvoyancu og dømikraft sum bert hendingafáur. Hann var t.d. ovurvinstrahallur maoistur og fagnaði tí tilafturskomna og kommunistiska Albania í 70´unum sum fyrimyndarliga mynstursamfelagið, og hann profeteraði, at tað blóðfátæka Mao-landið fór at vinna á øllum øðrum samfeløgum í heiminum við síni genialu planøkonomi (sic); men pendulið hjá honum hevur, síðani Berlinmúrurin datt, sveiggjað so langt hinvegin, altso til høgru, at sjálvt ultraliberalir fólkaflokksmenn hava ilt við at elta hann í asocialari og fíggjarligari kynismu! Hann hevur nú heilt gloymt og fortrongt sítt albanska nirvana. Hermaður er ótroyttiligur teoretikari og veruleikaflýggjari *par exellence* - praktiski og besverligi gerandisdagurin rínir ongantíð við hann, hann varnast als ikki støðuna beint uttan um seg, hvørki í Føroyum ella á Balkan!

Hesin sorgleysi opportunistur og ein av fremstu høgnesisku missionerunum málaði valdagin eina optimistiska fagurleikamynd av føroyska samfelagnum við so ovurhonds ljósareyðum litum, at sjálvt tær vónríku lýsingar av maoistiska paradísi hansara, Albaniu fyrst í 70´unum beinleiðis bliknaðu!

Valdagin var føroyska økonomiin, sambært Oskarssoninum heilt ómetaliga sterk - hon hevði aldri verið betri, helt Hermaður fleiri ferðir fyri! Tað var, sambært Hermanni at kalla einki arbeiðsloysi í Føroyum, fólk vóru glað, bjartskygd og fegnaðust serliga um fíggjarligu útlitini, og so hevði niðurskurðurin av blokkinum als ikki nervað føroyska búskapin, nærmast tvørturímóti!

Slíkt steinørt slutur segði formaðurin í okkara sonevnda búskaparráði. Eftir øllum at døma var hann edúur! Hvussu er ein slíkur økonomur innrættaður? Tað tykist sum um hansara dømikraft viðvíkjandi Føroyum í dag er líka so naiv, órealistisk og ábyrgdarleys sum meting hansara av Albaniu í 70´unum!

***Tann annar filosoffurin*** var harra *Sunnuleivur Rasmussen,* tónaskald og himmalfegin mentarmaður! Hesin lítillætni sunnudagsgarpur hevur leingi billað bæði sær sjálvum og øðrum inn, at hann er tað kvalificeraða føroyska svarið uppá bæði Mozart og Beethoven!

Vit lurtarar fingu valdagin varhugan av, at áðrenn fullveldissamgonguna høvdu Føroyar ikki rættiliga uppiborið Sunnuleiv, tí hann við sínum intellekti og sjáldsama talenti leingi hevði verið alt ov stórur fyri Føroyar. …, MEN bíða nú, síðani fullveldisgongguna vóru Føroyar andiliga nógv vaksnar og nærmast musikalskt bólgnaðar upp til hansara niveau, soleiðis at hann nú ikki fírdi fyri at lata seg heilt tónafjøtra av oyggjunum. Tað var forvitnisligt at hoyra!

Sunnuleivur Rasmussen var nú avbera bjartskygdur um bæði sína egnu framtíð og føroysk tónalíkindi yvirhøvur. Hann visti at siga, at fólk bæði syngja og spæla um allar Føroyar nógvar ferðir meira enn fyrr! Hann var púra ovfarin av sovorðnari musikalskari grøði! Sum tjóðveldismenn flestir metir Sunnuleivur helst kvantitet mundandi hægri enn kvalitet

Sambært Sunnuleivi er næstan einki óført á tónaøkinum, síðani vit hava fingið fullveldis-toganina. Hann næstan kendi tað á sær, tá ið hann ferðaðist í sínum tronga umhvørvi, at tónar beinleiðis spríktu upp úr berari hellu! Hví hesi gróðrarlíkindi ikki hava verið fyrr, greiddi hesin tonkjari ikki frá! Vóru tað so fáir føroyingar, sum trivu í eitt ljóðføri ella skóru út í song, áðrenn Sunnuleiv? Vit mugu nú seta musikalskt mark og vraka alt úr præ-sunnuleivskari tíð!

***Tann triði filosoffurin*** var sjálvur p*ontifex maximus,* evstiprestur í føroysku menta-meinigheitini, formaður í rithøvundafelagnum, superfrelst tjóðveldisskald, týðari av lættisoppabókini Potta-Harry, mest trúgvi og fasti klientur hjá *danska* listagrunninum (Dansk Kunstfond), tann ovurbeskedni, harra *Gunnar Hoydal!*

Hann hevði eisini sínar messandi hugleiðingar um, hvussu óført tað var at vera til beint NÙ, hvussu fantastiskt tað var at vera føroyingur, men eisini menniskja, og at NÚ, júst nú bar til at fáa føroyskar bøkur týddar beinleiðis til enskt mál, og ikki sum fyrr *via* danskt. Tað heilt stóra framlopið, sum sjálvandi skyldaðist landsins fráfarna stýri, var, at nú var eitt av egnu produktum hansara týtt til enskt, og harvið kunnu kanska milliardir fáa lut í og kveita inn í forvitnisliga og løgna hugaheim hansara! Hetta má vera eitt týðandi lið í globaliseringini!

Hesin beskedni, nærmast eyðmjúki mentajassur prátaði eisini, heilt hugtikin av sær sjálvum um, hvussu mentanin bara vaks og blómaði rundan um hann og landsstýrið! Vit fingu nærmast varhugan av, at politikkur fyrr mest hevði verið bondsk og karrá prosa, men nú við høgnesiskum stýri var tað poesi! Hvar hesin ovurmentaði Gunnar vappaði, og hvar hann ferðaðist, vóru bara bøkur, list, mentarfólk og mentagróður, og hann var sera takksamur mótvegis lagnu, socialum umhvørvi og landsins stýri! Hann hevur nú heldur ikki sørt at takka fyri!

Prosaiskir og undrandi lurtarar mugu spyrja: Hvør hevur nakrantíð forðad fyri, at føroyskar bøkur skuldu verið týddar til eitthvørt mál á knøttinum? Hava danir skyldina, og hevur tað nakað sum helst við okkara stjórnarviðurskifti at gera? Er tað ikki bara egin kleyvarskapur, um

Gunnarstankar ikki eru globaliseraðir fyrr enn nú?

Annars mistekur menta-Gunnar seg her, tí *Feðgar á ferð* er týdd úr føroyskum beinleiðis til eingilskt fyri nógvum árum síðani!

## Hættislig eskapisma

Hetta vóru teir tríggir træknívarnir, sum sjálvan valdagin á klombrutan hátt í donskum útvarpi royndu at telgja søguna eftir frelstum og serføroyskum tjóðveldisleisti.

Optimisma kann vera neyðug viðhvørt, men tá ið hon verður til eskapismu og beinleiðis søgufalsandi lívslygn, er hon vamlislig og andstyggilig.

Hesir tríggir uppgjørdu kuvøsu menn skullu vita, at tað blómandi paradísið Føroyar, sum teir royndu at fyrigykla dønum, er eitt land, sum ikki er til! Tvørturímóti - tað niðurpínda trotabúgvið, sum komandi landsstýrið skal rudda upp í, er í álvarsamari fíggjarligari neyðstøðu, tað er eitt land, sum er systematiskt mishandlað í skjótt sjey ár. Paradísið, sum Hermaður sigur, at hann sær, hevur sjáldan verið verri fyri fíggjarliga enn beint nú. Høvuðsvinnan er í kreppu - landsins likviditetur er nullstillaður; harafturat tørva flestøllum amboðum, skipum og bygningum grundleggjandi sanering. Mentanin er einsrættað, privatiserað og monopoliserað av tjóðveldis-herðaklapparum! Optimisman hjá Sunnuleivi og mentaGunnari er stupid flýggjan frá veruleikanum!

Annars skullu teir báðir kulturgarpar vita, at *mentunnarliga* hava vit føroyingar aldri verið meira *provinsiellir* og kritikkleysir enn júst undir hesum nalvaskoðandi óvitastýri!

Skal føroyska samfelagnum vera lív lagað, má skerast inn á bein, og træknívar bíta ikki!

ítróttur
Nr. 22 • týsdagur • 3. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sambadansur við Løkin

**Kanska eru tað gulu samba-litirnir á NSÍ-búnanum, sum nú hava fingið tveir brasiliumenn í leikarahópin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Marcello taldist í 2001 millum bestu málskjúttarnar í føroysku kappingini, men í 2002 var hann illa plágaður av skaðum, og í fjør var hann als ikki við á liðnum hjá B68*

Tað hevur ikki verið nøkur loyna, at runavíkingar hava havt í hyggju at styrkja um leikarahópin við einum áleypara til komandi kappingarár, og at Sonni L. Petersen fyri stuttum gjørdi av at fara til EB/Streym, hevur helst bara økt um tann tørvin.

## Marcello aftur á klettarnar

Nú bendi so alt á, at felagið hevur funnið tann leikaran, sum skal fylla hetta plássið, og talan verður um ein leikara, sum áður hevur havt sína gongd í føroyskum fótbólti.

Marcello Marcelinho leikti í árunum, 1999-2002 við B68, og serliga í 2001 fekk kviki framherjin orð á seg sum ein sera vandamikil harri.

Árið í 2002 fekk hann fyri ein stóran part oyðilagt av skaðum, og tá toftamenn í fjør fóru at satsa alt meira upp á leikarar, sum vóru uppaldir í felagnum, var ikki longur rúm fyri brasilsku leikarunum.

Hetta nýtti ein teirra, Messias Perreira, til at skifta bústað inn í Runavíkina, og fyri hansara viðkomandi má sigast, at talan var um eitt sera væl eydnað skifti. Sum miðverji taldist hann í fjør millum bestu leikararnar í føroysku kappingini, og nú tykist Marcello ætla sær at gera honum kynstrið eftir.

Okkum eydnaðist ikki at fáa fatur á NSÍ-formanninum, Jákup Mortensen, og ítróttar-samskipain, Valdimar Olsen, tykist ikki vera serliga nógv fyri at gera viðmerkingar til málið.

- Vit arbeiða sjálvandi við at styrkja um hópin, men meira enn tað sama fái eg ikki sagt í løtuni. So leingi sum eingin endalig avtala er komin í lag, kunnu vit ikki siga, hvørjar leikarar vit hava í hyggju at fáa til felagið, so frá okkum kemur eingin útmelding her og nú, sigur Valdimar.

Sambært keldum okkara er tó einki at fara skeivur í, at Marcello verður á NSÍ liðnum í summar. Sum skilst, so er tað í løtuni bert pappírsarbeiðið við innflytara- og arbeiðsloyvum, sum skal fáast í rættlag, og tá Marcello undan hesum jú hevur verið trý ár í Føroyum, so skuldi hetta heldur ikki verið tann heilt stóri trupulleikin.

# Føðingardagsmerki hjá HB

Flestum kunnugt, so stendur í Havnar Bóltfelag í ár fyri at halda 100 ára dagin fyri stovnanina, og sum vera man, so verður nógv gjørt burturúr.

Tiltøk av ymsum slag verða sjálvsagt á skránni, eins og bæði bóka- og fløguútgáva eisini verða tað.

Markeringin av hesum verður sjálvandi gjørd á ymsan hátt, men nú hevur alt hetta so fingið eitt felags eyðkenni.

HB hevur nevnliga latið gjørt eitt serligt búmerki, sum skal nýtast í samband við 100 ára haldið. Eitt búmerki, sum eisini verður at síggja á bringuni á besta mansliðnum, tá hetta fer at verja FM-heitið komandi árið.

Búmerkið hevur sjálvsagt skap av einum bólti, men hartil eru tað nógvir aðrir lutir, sum á hvør sín hátt vísa á júst HB og tað, sum felagið stendur fyri.

Reytt og svart eru eyðkendu litirnir í merkinum, og sjálvt búmerkið í miðjuni er nú Tórshamararin, fyri líka sum at vísa á, at hetta er felag úr Tórshavn.

Kring reyð/svørtu litirnar er so eisini ein gylt rond, sum við sínum 17 stjørnum ímyndar tey 17 FM-heitini í mansfótbólti hjá felagnum. Og so er spurningurin, um ein stjørna kann skoytast uppí, so hvørt sum árið líður. Tað vildu viðhaldsfólk felagsins so í øllum førum ikki havt nakað ímóti.

Tað er Repro-Z, sum í tøttum samstarvi við webmastaran á www.hb.fo, Marna Mortensen, hevur staðið fyri design'inum av nýggja búmerkinum, sum altso verður nýtt alt hetta kappingarárið

**-jm**